# Skúlin er ikki



## Lærarar eru ikki útbúnir til at taka sær av børnum við serligum tørvi, og skúlin fær nógv færri stuðulstímar, enn tørvur er á. Hetta kom fram á áhugaverdari ráðstevnu hjá MBF um javnstøðis rættindi í skúlanum

ÚTBÚGVING
*Dorit Hansen*
*dorithansen4@gmail.com*

Meðan landið lá í stjórnarloysi orsakað av einari stongdari hurð, savnaðust fleiri enn 200 fólk í gjár á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum, har ljós varð varpað á tær stongdu dyr, sum børn við breki renna seg í, tá tey fara í skúla.

Hetta var tann fyrsta av trimum ráðstevnum, sum MBF skipar fyri í samband við at farandi landsstýrið ætlar at viðtaka ST sáttmálan um vernd og rættindi teirra brekaðu. Henda fyrsta ráðstevnan setti sjóneykuna á fólkaskúlan og útbúgvingarmøguleikarnar hjá fólki við breki at nema sær eina útbúgving.

Og niðurstøðan var, at langt er á mál og nógv kann gerast fyri at bøta um útbúgvingarmøguleikarnar hjá børnum og ungum við breki.

### Øll samd um vánaligu støðuna

Ráðstevnan lýsti støðuna í føroyska fólkaskúlanum frá øllum sjónarhornum. Óli Wolles, formaður í Javna og pápi at dóttir við autismu, greiddi frá, hvussu stórur munur var á skúlamøguleikunum hjá soninum, sum ikki bar brek, og dóttrini við autismu. Niels Egelund, professari í sernámsfrøði lýsti avbjóðingarnar, sum skúlin fyri øll hevur, Hans Jón Thomsen, leiðari av NSR tænastuni í Eysturoy greiddi frá NSR tænastuni og hvat hann metti var neyðugt fyri at tryggja øllum nóg góða undirvísing, Karin Hammer, skúlastjóri í Kollfjarðar skúla setti orð á ørkymlandi støðuna hjá lærarum og skúlaleiðslum, tí tey stríðast við eina treka, illa mannaða og illa fíggjaða skipan, og Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur, greiddi frá ST sáttmálanum.

Hóast fyrilestrahaldararnir tí høvdu hvør sítt sjónarhorn, vóru tey øll samd um, at støðan hjá børnum við breki als ikki er nøktandi í dag.

- Tær vanligu royndirnar hjá foreldrum at børnum við breki eru, at tey fáa eingin tilboð og onga ráðgeving. Tey mugu sjálvi trilva seg fram, og nógv missa móti og flyta kommunu ella land, staðfesti Óli Wolles, formaður í Javna. Hann eftirlýsti eini skúlaskipan, sum veruliga tók støði í tørvinum hjá barninum heldur enn eina sum var mest ómakaleys hjá myndugleikunum.

### Truplari næmingar, veikari lærarar

Hagtøl siga, at 650 milliónir fólk í heiminum bera brek. Tey avvarandi vera eisini rakt, og tí kann man siga, at á leið tvær milliónir ella ein triðingur av øllum heimsins borgarum eru raktir av breki.

Sambært Niels Egelund, professara, er talið av børnum við serligum tørvi økt tey seinastu árini, og størsti parturin av hesari øking er hend í bólkinum, børn við atferðar-, kontakt- ella trivnaðartrupulleikum. Í Danmark er hesin bólkur vaksin við 300 prosentum síðani 1985.

Samstundis er talið av lærarum við sernámsfrøði lækka, tí útbúgvingin í sernámi var tikin av skemanum í donsku læraraskúlunum í 1985. Hetta var ein katastrofa, staðfesti Niels Egelund.

- Tíbetur er útbúgvingin komin aftur, og í dag er í Danmark krav, at øll læraralesandi hava eitt sindur um sernámsfrøði, og so er eisini møguleiki at lesa tað sum linjugrein.

Støðan í Føroyum er minst líka ring sum í Danmark, tí her hevur heldur ikki borið til at lisið til serlærara í fleiri ár, og danski batin er ikki komin til Føroya. Her ber framvegis ikki til at lesa sernámsfrøði sum part av læraraútbúgvingini.

### Tung og fátæk skipan

Karin Hammer, skúlastjóri í Kollafjarðar skúla legði í sínum fyrilestri dent á, at hon ikki fanst at fólkunum, sum arbeiddu í føroysku skúla- og sernámsskipanini. Øll royna at gera sítt besta, men skipanin er ikki nóg góð, staðfesti hon.

- Mannagongdirnar eru stirvnar og drúgvar. Vit kunnu bara søkja um stuðulstímar eina ferð um árið, hetta er í februar mánað. Tríggjar mánaðar seinni fáa vit at vita, at vit fáa nakrar fáar tímar, og so mugu vit sum frægast royna at býta hesar millum tey børn, sum hava serligan tørv, greiddi Karin Hammer frá.

Hon eftirlýsti ráðgeving í, hvussu fáu tímarnir skuldu býtast til allan tørvin skúlin hevði.

- Vit fáa tildømis tredivu tímar. Hvat skulu vit gera við dreingin, sum hevur tørv á fullum stuðli, hvussu við barninum við ADHD, og hvat við teimum sum hava lesitrupulleikar? Um



*Deyvatulkur var við á ráðstevnuni, og Elin Winther Poulsen var orðstýrari. Á leið 230 luttakarar vóru, og nógv høvdu viðmerkingar, tá møguleiki var fyri kjaki aftaná fyrilestrarnar*





*Óli Wolles, formaður í Javna og pápi at dóttir við autismu, greiddi frá, hvussu tungt tað er hjá foreldrum at stríða seg til nøkunlunda sømilig tilboð í føroysku fólkaskúlaskipanini*



*Janus Jensen, fulltrúði í Mentamálaráðnu Hammer, skúlastjóri í Kollafjarðar skúla*